# ítróttur

Nr. 9 • hósdagur • 12. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Josef skaddur í slakan mánað

Tað var ein dyggur smeitur fyri Kyndil, at kviki vongspælarin, Josef Abrahamsen, í fyrra hálvleiki av fyrru hálvfinaluni móti StÍF á Skála í gjárkvøldið meiddi sær annað knæið. Í fyrstu atløgu bendi nógv á, at talan var um ein krossbandsskaða, men soleiðis var tíbetur ikki.

Tá ið vit tosaðu vit Josef tíðliga í morgun, hevði hann verið hjá lækna, og hagani vóru boðini, at eitt liðband uttarlaga í knænum var toygt. Hetta merkir, at Josef skal binda frið í tvær vikur, áðenn hann kann byrja at venja aftur. Sostatt gongur tað helst ein slakur mánaður, áðrenn hann aftur verður at síggja á vøllinum.

**tn**



*Í Kyndli óttaðust tey, at talan var um krossbandsskaða, sum noyddi Josef Abrahamsen av vøllinum mikukvøldið. Men so álvarsligt var tað tíbetur ikki*

Mynd: Álvur Haraldsen

SÍ-ÍF 3-2 (21-25, 25-16, 22-25, 25-22, 16-14):

# SÍ hevndi finalutapið

**Í einum sera spennandi dysti eydnaðist tað mikukvøldið SÍ at staðfesta annað plássið, tá endaspælið hjá kvinnum fór ígongd**

**FLOGBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um ein sera javnan og spennandi dyst, har einki sum helst var avgjørt, fyrr enn seinasti bólturin í seinasta settinum varð sligin.

Unga SÍ-liðið hevur tvær ferðir í ár havt møguleika at vinna seg fram til steypafinaluna, men í báðum førum er henda ætlanin tó miseydnað. Sunnudagin var tað júst ÍF, sum syrgdi fyri hesum, tá tær vunnu finaluna í Mjølnir-kappingini, og tað var eitt tap, sum SÍ hevði sett sær fyri at hevna.

Í mun til dystin í Klaksvík, so tóktist dirvið hjá sørvágskvinnunum hesa ferð at vera væl størri. Móttøkurnar riggaðu væl, og á tann hátt eydnaðist eisini liðnum at trýsta ÍF við varierandi spælið yvir um netið, skilst.

ÍF legði seg tó ikki uttan mótstøðu. Tær vunnu bæði fyrsta og triðja settið, og tí gjørdist neyðugt við einum fimta og avgerandi setti, tá stigini skuldu plaserast. Eitt avgerandi sett, har møðin spakuliga var farin at gera um seg, og har sálarliga styrkin hjá spælarunum tí veruliga skuldi standa sína roynd. Júst hetta hevur kanska verið ein trupulleiki hjá SÍ í teimum báðum taptu finalunum, men mikudagin vístu tær týdningin, sum royndirnar úr júst slíkum finalum kunnu hava fyri eitt lið.

Tær hildu høvdið kalt, og v ið sigrinum tóku tær eitt stórt fet mótvegis fyrstu heiðursmerkjunum hjá SÍ í bestu kvinnudeildini. Hvørt hesi so verða av gulli, silvuri ella bronsu, ber enn illa til at staðfesta, men tær styrktu í øllum førum væl og virðiliga um sína støðu við sigrinum.

Samstundis má ÍF nú ásanna, at tær ikki longur einsamallar kunnu gera av, hvørt tær framvegis skulu roknast sum gullkandidatar. Munurin upp til Drátt.



*Sum vera man var lagið í toppi, tá SÍ mikukvøldið byrjaði endaspælið við teprum sigri á ÍF*

Kyndil II-VÍF 16-22 (9-13):

## VÍF hevur beina finalukós

**Uttan at teir nakran tíð sveiggjaðu seg upp móti meistaraspælinum, vann VÍF í gjárkvøldi tryggan sigur á næsta besta Kyndils-liðnum**

**COCA COLA-KAPPINGIN**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialuri.fo*

Talan gjørdist ikki um nakra sensatión, tá næst bestu Kyndils-menninir mikukvøldið tóku ímóti VÍF.

Kyndil hevði ávegis til hálvfinaluna sent H71 úr kappingini, og tí vóru kanska nøkur, sum vónaðu, at Kyndil enn einaferð kundi skapa tað heilt stóru sensatiónina.

Eina løtu vóru teir grønu eisini væl við. Fyrstu 20 minuttirnar var millum lítil og eingin munur á liðunum báðum, og teir gulu høvdu eisini hug at ilskast um, at spælið ikki gekk eftir vild.

Tað eydnaðist tó vestmenningunum at skapa eitt hol stutt undan steðginum, og hetta hildu teir fast um gjøgnum seinna hálvleik. Endaliga úrslitið gjørdist so ikki nakar stórsigur til verjandi føroyameistararnar, men við seks málum til góðar skal tað vera ógvuliga løgið, um teir í seinnu hálvfinaluni tveita eitt finalupláss burtur.

### FAKTA

**Kyndil II-VÍF 16-22 (9-13)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Regin Fossaberg 4(3), Ken Zachariasen 3, Jónleif Sólsker 2, Rani Ellingsgaard e2, Ragnar Stakksund 2, Bárður Johannesen 1, Hans Arni Thomsen 1, Pætur Johansen 1
**VÍF:** Agnar Joensen 6, Áki G. Olsen 5, John Zachariassen 4, Sámal Joensen 3(1), Sjúrður Poulsen 2, Harald Bjørgvin 1, Ingi Olsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, VÍF 3
**Útvísingar:** Kyndil 6, VÍF 3
**Dómarar:** Karstin Joensen & Kristian Joensen